
Óforsvarlig røkt av sjúklingum

Nú leggja vit ábyrgdina frá okkum. Viðurskiftini á afturlatnu deildini fyri sálarsjúk eru út av lagi vánalig við so at siga ongum starvsfólkum. Hetta gongur nógv út yvir sjúklingarnar, sigur formaðurin í sjúkrarøktarfelagnum, Henning Christensen.

Tað var eitt stórt framstig, tá deildirnar fyri m.a. sálarsjúk fyrst í sjeytiárunum vórðu tiknar í nýtslu í Føroyum.

Hinvegin má sigast, at illa hevur gingist at røkja hesa uppgávu.

Nú er so illa statt, at starvsfólkini boða frá, at tey taka ikki longur ábyrgdina av, at sjúklingarnir fáa ta røkt, sum tey skulu.



ARBEIDSEFTIRLITIÐ

Dagfesting: 22.01.1987.

Til
Landssjúkrahúsið,
att. Karter Højgaard, umsjónarm.,
100 T ó r s h A V N

VIÐVØKJANDI ARBEIDSVIÐURSKIFTUNUM Á PSYK.DEILD 2.

Eftir áheitan hevur undirritaði í dag verið og kannað ymisk viðurskifti á psyk. deild.

Arbeiðseftirlitið skal til gera vart við, at arbeiðsviðurskiftini á nevndu deild eru út av lagi vánalig.

Arbeiðsbyrðan er alt ov tung. Á deildini eru 13 pleygarastørv normeraði, men eru bert 7 störv sett.

Vit hava kannað arbeiðsætlanina fyri desember mánað 1986, og av nevndu ætlan sæst at pleygararnir hava mist nógvar fridagar. Eisini hava teir í fleiri førum verið á vakt í 24 timar uttan slit, eisini hava teir í fleiri arbeitt 16 timar uttan slit o. s. fr.

Avlit, at einki røkist fyri einari varandi loysn í bráði t. d. einum pleygaraskúla, heitir Arbeiðseftirlitið við hesum á leiðsluna á psyk. deildunum um beinanvegin, at fara undir eina fyribils loysn. Verður hetta ikki gjørt, so er vandi fyri, at pleygararnir missa stoðið, og rýma av deildini.

Grein 25 í lóg um m. a. arbeiðs- og hvíldartíðum, sum vórðu settar í gildi, sambært løgtingslóg nr. 58 frá 1974 hevur í fleiri førum yvirhevur ikki verið hildin.

f. ARBEIDSEFTIRLITIÐ
H. E. Solberg

UNDØMI 1 | UNDØMI 2 | UNDØMI 3 | UNDØMI 4 | UNDØMI 5

Í brævi til Landssjúkrahúsið mælir Arbeiðseftirlitið til at gera eina fyribilsloysn. Brævið er skrivað 22. januar. Enn er einki hent.

Ongantíð so galið sum nú

Deild 2 á Statshospitalinum læt aftur 1. juni og ístaðin læt deild 4 upp. Hetta er afturlatna deildin fyri sálarsjúk. Henning Christensen, formaður í Sjúkrarøktarafelagnum, sigur, at trotið á mannligum sjúkrarøktarum hevur ongantíð verið so stórt sum nú. Sambært eini gamlari avtalu við leiðsluna skulu tveir mannligir sjúkrarøktarar vera á hvørjari vakt, men í dag er í mesta lagi ein. Viðhvørt eingin. Nú í summarfrítíðini er heilt galið.

Hetta gongur eisini nógv útyvir sjúklingarnar, sigur Henning Christensen. Teir sleppa ikki út um eina hurð. Tað sleppa straffifangar hóast alt. Men so er ikki við sjúklingunum á deild 4 á Statshospitalinum í Havn. Hetta er orsakað av starvsfólkatroti og vánaligum kringumstøðum. Heldur ikki er gjørligt hjá sjúklingunum at gera likamligt arbeiði uttandura — sum annars hevði verið ein tann besti heilivágurin fyri tílíkar sjúklingar.

Fáir søkja

Spurdur um, hví fleiri starvsfólk ikki verða sett, sigur Henning Christensen, at í Føroyum eru eingi at søkja, og hóast søkt er fleiri ferðir í donskum bløðum, eru fáir umsøkjarar. Teir, sum søkja, seta sum krav, at teir fáa eina íbúð, men her er eingin tøk, og ti verður áhugi teirra av ongum, sigur Henning Christensen, og leggur afturat, at t.d. í Danmark er eisini tørvur á mannligum sjúkrarøktarum.

Føroyskur sjúkrarøktaraskúli

Besta loysnin fyri allar partar hevði verið, at vit fingu føroyskar sjúkrarøktarar. Tað fáa vit kanska einaferð, men tað verður í hvussu er tvey ár at bíða. Hetta er tíðin ein sjúkrarøktaraútbúgving tekur og skúlin er ikki settur á stovn enn.

Henning Christensen sigur, at ein føroyskur sjúkrarøktaraskúli hevur verið stóra ynski teirra í mong ár, og nú er útlit fyri at hesin skúli verður settur á stovn í heyst. Á fundi við m.a. landsskúlafyrisitingina í vár varð avrátt, at sjúkrasystraskúlin skuldi standa fyri fyrireikingunum, men enn er einki gjørt. Nú verður lýst eftir fólki, sum skal standa fyri hesum fyrireikingunum.

Samstarvstrupulleikar

Men við hesum nýggja skúla eru eftir øllum at døma ikki allar súður syftar. Fáir mannligir umsøkjarar hava verið til sjúkrarøktaraskúla í Danmark og lítið hugsandi er, at stórt tal fer at søkja á føroyska skúlan, sigur Henning Christensen.

Partvís er orsøkin ov vánalig løn, men hetta er ikki øll orsøkin.

Tað eru eisini stórir samstarvstrupulleikar við sjúkrahússtjórnina.



Sum fuglur í búri. Vindeygað er einasta samband sjúklingarnir hava við náttúruna. (Modell-foto)

Sjúkrahússtjórnin fer við starvsfólkinum eftir prinsippinum »kæft — trit og retning«, og tað er ikki tað, sum starvsfólk lata

ATAK
eitt gott tak
pf VESTMANNA TIMBURHANDIL
3860 Vestmanna . Telefon 24170